# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Ókendu Føroyar er heitið á framsýningini hjá Inga Sørensen í Stephanssons Húsi*

*Mynd: Stephanssonhús*

# Myndir úr havsins dýpi

Í dag letur Ingi Sørensen, vinnukavari í Havn, upp eina myndaframsýning í Stephanssons húsi á Kongabrúnni í Havn.

Hetta er sama framsýning, sum var í november 2008. Ingi sigur, at so stórur áhugi var fyri framsýningini, at hann hevur avgjørt at lata hana upp aftur nú í januar.

Ingi er bæði útbúgvin sum frítíðarkavari og vinnukavari. Hann sigur, at tað er stórur munur á hesum útbúgvingum. Útbúgvingin sum vinnukavari kann taka upp til eitt ár, meðan útbúgvingin sum frítíðarkavari tekur eina til tvær vikur.

Við myndatóli hevur Ingi tikið hópin av myndum á havsins botni kring oyggjarnar. Hann sigur, at tað er ein heilt annar heimur, ið letur seg upp, tá man kavar. Har er so ómetaliga nógv vakurt at síggja niðri í sjónum. Nógv ymisk fiskasløg og sjáldsamar plantur umframt taran.



*Nógv vakurt at síggja niðri í sjónum, nógv ymisk fiskasløg og sjáldsamar plantur*

*Mynd: Stephanssonhús*

Framsýningin er opin gerandisdagar frá kl. 16-18, og tá er Ingi sjálvur til staðar í framsýningarhølunum. Hon verður opin í tvær vikur. Ingi sigur at skúlaflokkar og onnur eru vælkomnir at vitja framsýningina uttan fyri tíðina, tá framsýningin er opin. Tey kunnu bara gera eina avtalu við Setphansson Hús á telefon 314291.

**mg**

## Andlát og jarðarferðir

**Nina Magnussen**, ættað av Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist á Bispebjerg Hospital leygardagin 10 januar, 48 ára gomul.

**Elisabeth Bjarnarson**, ættað av Tvøroyri, búsitandi í Reykjavík, andaðist leygardagin 10. januar, 60 ára gomul.

## Dagurin

**13. januar. Tjúgunda halgi**. Jólini enda. Tá ið tey taldu jólini og kvóðu um alt tað, sum Sankta Mortan gav, kvóðu tey: tjúgu stútir, nú eru jólini úti. Tjúgunda kvøld hevur verið hildið sum høgtíðsdagur onkustaðni í Føroyum. Dagurin verður í álmanakkanum eisini róptur Hilarius, til minnis um ein biskup í Poitiers, ið var mettur høgt sum kirkjulærari og sálmaskald. Hann hevur yrkt sálmin. Tær Guð, sum ein ræður himni á. Hilarius doyði í árinum 367.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá mín kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Ingrid Hansen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum, sum vóru um hana meðan hon lá á sjúkrahúsinum.
Tøkk til Hjalgrím Davidsen fyri orð og sang í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk til Hansu Petersen og Jógvan Fríðriksson fyri orð í kirkjuni og við grøvina.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og berarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við at baka, og tykkum, sum hjálptu til við ervinum í bygdarhúsinum.
Tøkk fyri blómur kransar og gávur.

*Fyri tey avvarðandi*
**Harry og børnini**

